## Minni áhugi fyri Clinton

Tað gekk striltið at selja seinastu atgongumerkini til vinnuráðstevnuna við við Bill Clinton og Hans Blix 1. oktober. Eftir at sølan hevði verið opin í tveir og ein hálvan tíma, í gjár vóru bert fimm atgongumerki seld. Fyrru ferð atgongumerki til vitjanina vóru í fríari sølu, tók tað bert 20 minuttir at selja tey knapt 120 atgongumerkini til vinnuráðstevnuna. Tey 120 atgongumerkini vórðu seld fyri tilsamans 600.000 kr.



# Gera ljóðmátingar á Signabø

**Tórshavnar havn hevur sett eina kanning í verk, sum hevur til endamáls at fáa staðfest, hvussu álvarsligt tað er við larmi frá teimum russisku skipinum, sum koma inn á Kollafjørð. Útbyggingin av havnini heldur fram sum ætlað**

UMHVØRVI
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Talan er um ljóðmátingar, sum Tórshavnar havn hevur biðið Johannes P. Steingrund, sivilverkfrøðing í Saltangará, um at gera. Hetta sigur Leivur Hansen, sum er formaður í havnanevndini hjá Tórshavnar Kommunu.

Johannes P. Steingrund er serfrøðingur í akustykki, ella ljóðviðurskiftum, sum hann hevur arbeitt við í nógv ár. Bæði í Danmark, Føroyum og í Týsklandi.

Enn er hann ikki liðugur við mátingarnar, og tí er ongin niðurstøða gjørd um, hvussu er statt við larminum frá russaraskinunum, ið brúka Kollafjørð til millum annað at umskipa veiðu til Samskip, sum brúkar Kollafjørð sum avskipingarhavn.

Stór ónøgd hevur verið millum íbúgvarnar á Signabø um larmin frá russaraskipnum, og at Tórshavnar Kommuna hevur gjørt av at bingjuhavn á Signabø. Millum annað hevur kommunan fingið handað mótmælisskriv frá borgarum í bygdini.

Leivur Hansen sigur, at arbeiðið við bingjuhavnini heldur fram sum ætlað.

Bingjuhavnin skal vera 150 metrar long, og ein serligur rampi skal gerast, ið kann gera tað møguligt hjá Norrønnu at sleppa at har, tá veðrið ikki er til tað í Havn.

J&K Petersen standa fyri byggingini, ið fer at kosta 53,7 mió. kr. Nógv av tilfarinum til planeringina er komið úr Vágatunlinum.



*Áheitan á russarar um at avmarka larmin umborð á skipunum, tá tey liggja á Kollafirði, hevur hjálpt, heldur formaðurin í havnanevndini hjá Tórshavnar býráð, Leivur Hansen.*

*Savnsmynd*

# Ung á dansistevnu við Gjógv

**Seinasta vikuskiftið í hesum mánaðinum skipar Sláið Ring fyri tiltakinum "Ung í dansi". Tiltakið verður á Gjáargarði. Øll ung, sum ganga í framhaldsdeild ella hava aldur til tess, hava møguleika at tekna seg. Pláss er fyri 60 luttakarum**

DANSUR
*Tíðindaskriv*

Sláið Ring hevur í ár valt at bjóða ungfólki á eina dansistevnu á Gjáargarði við Gjógv. Ikki nýtist teimum ungu at hugsa um pengapungin fyri at vera við. Tiltakið er ókeypis, bæði uppihald og flutningur.

- Á Gjáargarði er pláss fyri 70 gistandi, og hava vit gjørt av at býta tað upp soleiðis, at luttakaratalið verður 60 ungdómar og 10 vaksin, ið koma at hjálpa til, sigur dansifelagið í tíðindaskrivi.

Tiltakið byrjar fríggjakvøldið 28. september klokkan 18.00 við náttúrða, dansisøgu og undirhaldi. Seinni verður farið upp á gólv saman við Eysturoyar Dansifelag.

Leygardagin verða tvey skeið á skránni. Tað fyrra kallast "Hvussu kunnu vit læra okkum kvæðini", og tað seinna ber heitið " Dansisiðir og leiklutur skiparans". Tað verða Petur Olivar í Hoyvík og Jónleif Johannesen, sum greiða frá. Eisini fara ungfólkini ein túr í bygdini. Um kvøldið verður skipað fyri undirhaldi og dansispølum. Klokkan 21.00 verður aftur farið upp á gólv. Hesaferð saman við Dansifelagnum á Látrinum.

Sunnumorgunin verður tikið samanum, áðrenn vit fara heim.

# Altíð tengdur at Fólkaflokkinum

**Rodmund Nielsen slær nú fast, at hann altíð hevur verið partur av Fólkaflokkinum, og alt annað tos stavar meiri frá miðlunum enn honum**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ein av heilt stóru og spennandi spurningunum upp undir komandi val hevur verið, um Rodmund Nielsen fer at stilla upp – og í fall fyri hvønn.

Fyri tíð síðani gekk tað sum rótasúpan runt Skálafjørðin og víðari út um landið, at tað var upp á tal, at fyrrverandi borgarstjórin í Runavíkar Kommunu fór at stilla upp fyri Sambandsflokkin.

Eisini Sosialurin royndi at fregnast um hetta, men einfalda svarið frá Rodmundi Nielsen tá var, at hann onga støðu hevði tikið til nakað sum helst. Hvørki um hann fór at stilla upp, ella um so var fyri hvønn.



*Rodmund Nielsen hevur ikki gjørt av, um hann stillar upp til komandi løgtingsval. Men ger hann tað, verður tað fyri Fólkaflokkin*

Men nú er annar av hesum spurningunum í hvussu er avkláraður sambært høvuðspersóninum sjálvum.

- Eg havi altíð verið ein partur av Fólkaflokkinum, og tað eri eg enn. Alt hitt tosið um, at eg møguliga skuldi stilla upp fyri aðrar flokkar er nakað, sum miðlarnir hava róð upp undir, sigur Rodmund Nielsen.

Tað er sostatt greitt, at um fyrrverandi borgarstjórin stillar upp, verður tað fyri Fólkaflokkin.

### Ikki tikið støðu

Tá Rodmund Nielsen fór frá sum borgarstjóri var grundgevingin hon, at so nógv var at gera í fyritøkunum, sum hann er partur av. Og sum skilst er hetta framvegis orsøkin til, at hann ivast í, um tað er rætt av honum at stilla upp til løgtingsvalið. Men tíðin hevur eisini nakað at siga.

- Tað er í hvussu er greitt, at eitt val í ótíð fyri meg hevði komið illa við, tað hevði verið eitt hálvt ár ov tíðliga, sigur Rodmund Nielsen.

Hann vísir eisini á, at eitt kommunuval og eitt løgtingsval eru hvør sítt, og at avkvøðurnar als ikki bara kunnu flytast frá einum til annað. So tað kann sigast, at eisini á tí økinum vigar hann og metir um sínar møguleikar.

- Eg kann í hvussu er siga, at eg ikki enn havi tikið støðu til, um eg fari at stilla upp til komandi løgtingsval. Men eg kann siga, at stilli eg upp, verði eg flokstrúgvur móti Fólkaflokkinum, sigur Rodmund Nielsen.